# Skulu børn í skúla tá tey eru 6 ár?

MAJBRITT
JACOBSEN
Pedagogur a Dagstovninum á Argjum

Vit høvdu eina pisa kanning í fjør. Hon var vánalig. Tað kunnu vit skjótt gerast samd um, og hvat gera vit so? Ja, tað er ein góður og áhugaverdur spurningur.

Skúlin, sum vit kenna hann í dag, er ikki góður nokk – tað vísur pisa kanningin okkum. Fólkaskúlin, ið ikki hevur megna at førleikamenna næminginum á fullgóðan hátt, skal hava enn fleiri næmingar inn í 2008. Teir skulu inn á teir niðurslitnu skúlarnir, við vánaligum hølisviðurskiftum. Skúlarnir hava illa nokk pláss. til at hýsa teimum núverandi næmingunum. Nú skulu teir eisini taka tey 6 ára gomul inn… Hví? Tí tað gera hini!

Ja, tað gera hini. Men er tað harvið sagt, at vit eisini skulu gera tað? Tað stendur í álitinum, at børn skulu í skúla, tá tey eru 6 ár, men tað eru ongar grundgevingar, uttan tær, at hini gera tað.

Tað framgongur ikki greitt í álitinum, hvør kemur at taka sær av undirvísingini av teimum 6 ára gomlu. Uppá spurning um hetta á MMR, fái eg at vita, at av tí tað er innan skúlagátt, so eru tað lærarar, ið koma at taka sær av hesi undirvísing.

Um børnini skulu í skúla, tá tey eru 6 ár, hvat hevur skúlin so at bjóða, út yvir vánalig hølisviðurskifti? Um tilmæli verður fylgt, verður undurvísingatalið hækka, frá núverandi 3,6 tímar til 4 skúlatímar um dagin. Síðani skulu børnini í ein líka so fullan frítíðarskúla.

**Er nakað alternativ?**
Vit kunnu hava forskúlar í barnagørðinum.

Á dagstovninum á Argjum, hava vit tey seinastu 6 árini haft eina stovu, ið leggur seg tætt upp at einum forskúla. Tey 6 ára gomlu, ganga á einari stovu fyri seg. Her eru leikur og avbjóðingar, ið svara til teirra aldur og menning. Vit hava eina námsætlan, ið leggur upp til at børnini skulu mennast og búnast, so tey eru klár at taka ímóti tí avbjóðingini tað er, at fara í skúla. Tey fara gjøgnum eina stóra sosiala og kensluliga menning – vegna málrætta arbeiðið á hesum økið. Somuleiðis læra tey at móttaka felagsboð, at taka ábyrgd, læra egnan samleika at kenna og annars hava eitt hendingarríkt ár, ið leggur bestu lunnar undir víðari menning.

Hetta gera vit millum annað, við at fara túrar. Vit vitja ymisk støð og stovnar, fyri at gera børnini varug og vitug um tað samfelag, ið er og verður teirra. Hvørja viku hava vit rokning, vit fara til fimleik og gera ymiskar uppgávur, vit hava tónleik og myndlist, umframt nógv spæl millum børnini.

**Skúlasamstarv**
Vit hava sera gott samstarv við Argja skúla viðvíkjandi skúlabyrjan. Í mai mánað, fáa øll børn, ið skulu byrja í fyrsta flokki á Argja skúla eftir summarfrítíðina, eitt bræv. Í brævinum verða tey boðin vælkomin í frítíðarskúlanum á Argjum, har vit fara at hugna okkum, spæla eitt spæl ella tvey og gera eina telefonbók. Tey fáa eitt papír, har tey skulu skriva sítt navn, eftirnavn, bústað, telefonnr., navn á foreldrum og hvør er teirra besti vinur. Hvørt barn hevur eina mynd av sær sjálvum við. Hesa líma vit á, áðrenn vit margfalda bøkurnar, so øll børnini fáa eitt eintak heim við. Á hendan hátt eru teir nýggju floksfelagarnir ikki so nýggir tann dagin skúlin byrjar.

Síðani verður fari oman á Argja skúla har núverandi fyrsti flokkur tekur ímóti. Hetta er nakað tey eru sera stolt av. Tey royndu jú tað sama seinasta ár. Børnini greiða nýggju næmingunum frá, hvat ein ger í teimum ymisku lærugreininum, rokning, føroyskt osf. Tey fáa høvi at heilsa uppá lærarnar, tey skulu hava eftir summarfrítíðina. At enda vera tey víst runt á skúlanum. Hetta samstarv er blivi betur ár fyri ár og verður leypandi tillaga okkara royndum og tørvi. Vit eru sera glað fyri samstarvi og síggja nýggjar møguleikar í framtíðini. Eitt nú er møguleiki fyri at lærarin kemur út á stovnin, at síggja børnini, og læra tey at kenna, í teirra vanta umhvørvið…

Tað eru nógv og sera ymisk tilboð til tey 6 ára gomlu í dag. Og tað meti eg ikki er gott nokk. Vit hava alt frá barninum, ið er heima hjá mammu síni, barnagarðin við blandaðum aldursbólkum, teimum við ongum skúlabólki, og teimum, ið hava skúlabólk eina til tvær ferð um vikuna, tey ið hava skúlabólk burturav, umframt ein forskúla.

Hóast hesar ymiskleikar, meti eg tað vera besta boðið at tað eru barnagarðarnir ið hava forskúla. Pedagogarnir hava bestu førleikar til at taka sær av menningini hjá børnum í hesum aldri.

Eg loyvi mær at ivast í um føroyski fólkaskúlin kann bjóða sama støði í aug. 2008!

# Óli og kryvjimaskinan

DAN R.
PETERSEN



Í Dimmalætting 14. november eitt áhugavert orðaskifti við Óla Jacobsen. Tað er so áhugavert, at tað gevur mær stoff til fleiri greinar.

T. d. hetta brotið:"... Hann nevnir m. a. stríð fyri at fáa kryvjimaskinur umborð á ísfiskaskipini og síðani stríðið fyri, at menninir ikki skuldu gjalda fyri hetta". Sjómenn spyrja: Hvat stríð hevur Óli gjørt sær, at fáa kryvjimaskinur umborð. Ongin kennir hetta stríð.

Sum eg fyrr havi nevnt, so kom kryvjimaskinan 30 ár ov seint. Meðan útlendingar fingu hetta møðsama arbeiðið automatiserað, stóðu føroyskir sjómenn og kruvdu við hond døgn eftir døgn eftir døgn. Meðan Óli førdi pennin móti skiftandi landsstýrum, umsiting, útvarpi og øðrum óviðkomandi, píndi reiðarin manningina niður. Sum limur í fiskimannafelagnum havi eg staðið upp í samfullar 43 tímar og kruvt. Nóg illa úr oljuklæðunum. Bert tí at reiðarin ikki vildi automatisera arbeiðið. Hetta er ikki reyp, tað kenna allir trolaramenn til.

Menn leggjast uppi í góðum árum, niðurslitnir. Var viljin til staðar, so fór Óli við læknaváttanum í hondini til reiðararnar og setti krøv. Læknaváttanir upp á niðurslitnar sjómenn eru lættar at fáa hendur á. Tíverri. Og hjálpti tað ikki so var at fara í bløðini og venda kanónini rættan veg.

Enn mangla nógvar kryvjimaskinur.

Arbeiðsumhvørvi er eitt púra ódýrkað øki hjá Fiskimannafelagnum.

At Óli steðgaði fyri, at manningarnar ikki sjálvar skuldu gjalda fyri maskinurnar, átti hann at tagt við. Har fór eg inn í málið, tá manningarnar vóru kroystar longur enn lógligt er, og teir onga hjálp høvdu fingið frá Fiskimannafelagsformanninum.

Tað er ein søga fyri seg, sum eg kann venda aftur til seinni.

# Latið okkuum menniskju smíða jarðiskar lógir

KATARINA HYLTÉN-
CAVALLIUS
Torshavn

Antidiskrimineringslógin er til fyri at verja útsettar minnilutabólkar í samfelagnum. Jú meira nágreinilig ella útgreinað hendan lógin er, jú sterkari verður rættarverjan og við tí samstundis eitt tryggari samfelag. Samkynd eru, sum tað skilst á øllum brøgdum, ein útsettur minniluti í Føroyum, eftirsum eitt paragraffiskoytið um, at man skal verða vardur uttan mun til seksuella orientering skal vekja slíka mótstøðu. Hendan mótstøða er altso í sær sjálvum prógv um, hvussu nógv tað er brúk fyri hesari lógini, og hvussu nógv hesin minnilutabólkur hevur fyri neyðini at verða vardur av henni

Fleiri NEI-sigarar sum kalla seg kristnar, vísa til Guðs orð fyri at ávísa, at tað at vera samkyndur er skeivt, og at samkynd tí ikki skulu fáa eitt serstakt pláss í lógini. Eg eri kristin, men standi púra spyrjandi um, hvussu man kann vísa til orð Bíbliunnar, og í sama andadrátti fullkomuliga gloyma tað grundleggjandi í kristna gleðiboðskapinum: Ger móti øðrum, sum tú vilt onnur skulu gera móti tær. Tann, ið er uttan synd, kastið fyrsta steinin. Dømi ikki, tá skulu tit ikki verða dømd.

Um Jesus hevði komið til Føroyar ár 2006 er einki ivamál um, í hvørjum parti Hann hevði verið. Hann hevði, sum altíð, verið í parti við teimum útstoyttu ella teimum veiku og hevði aldrenn góðtikið, at ein so human og umráðandi lóg sum lógin um antidiskrimination og tess ískoyti bleiv sett spurnartekin við

Um tú av religiøsum orsøkum heldur, at tað at vera samkyndur er ein synd, so gloym ikki, at vit við kristnum grundarstøði skulu møta okkara medmenniskjum, syndarar ella ikki syndarar, við toleransu, kærleika og miskunsemi. Lat tann Guð tú trýrt á avgera, hvat sum er synd og hvør er syndari, og latum okkum menniskju heldur smíða jarðiskar lógir, sum verja okkum móti allari forfylging, og fremja eitt humant samanhald, har tað er pláss fyri okkum øllum at liva.

# Koyrikort, Lógarbrot og umsitingarligt fusk

HJALMAR N.
POULSEN



Nógv rumbul hevur seinastu tíðina verið um koyrifrálæru og próvtøku av koyrikorti til motorsúkklur.

Ætlaðin við umtalaðu kunngerðini hevði til endamáls at verja ungdóm okkara, soleiðis at hann ikki sluldi koma sær í óføri av ókunnleika í ferðsluni.

Júst tað øvugta er hent.

Hetta tí at lógarbrot ella umsitingarligt fusk er framt í føroysku landsumsitingini. Kalla tað nú hvat tú vilt, men týdningurin er tann sami og avleiðindarnir hareftir.

Vinnumálaráðharrin vildi vera við, at hetta ikki var lógarbrot. Men hann hevði ikki nakað annað gott orð at kalla "syndromið". Helt víðari uppá, at slíkt ikki far avleiðingar fyri umsitingina sum so.

Jú takk, slíkt eru vit so von við og hetta er heldur onki umdantak.

# Sjúkir fiskimenn! Brotsmenn?

JAN
HØJGÅRD
Toftir

Fiskimenn, ið hava fingið skaða ella á ein hvønn hátt stríðast við heilsuna, hava í langa tíð følt seg illa viðfarnar; ja fiskimenn kenna seg ofta verri fyri, enn teir ringastu brotsmennirnir.

Tað verður mangan tikið til, "ein skal verða sterkur fyri at vera sjúkur," her verður víst til vantandi umsorgan frá almennari síðu. Nógv høvdu helst kallað tað ágang frá myndugleikum og almennum stovnum. Almannastovan, Tryggingasamband Føroya og aðrir stovnar hava ymsar forðingar, ið kunna gera tað trupult hjá fiskimanninum at fáa tað útgjald, sum hann hevur goldið fyri. Hetta verður á fakmáli rópt tekniskar forðingar. Slíkar forðingar kenna vit væl frá altjóða handli, og eru tær undanførslur fyri at sleppa frá at halda galdandi avtalur. Ein forðing, sum fiskimenn renna seg í ferð eftir ferð er, at teir eru ov seinir at boða frá skaðanum, teimum hevur verið fyri. Hetta hevur ført við sær, at fleiri fiskimenn ikki rættliga hava hættað sær undir, at kravt teirra rætt sum borgarar í hesum landi. So kann ein velja at kalla tað eina tekniska forðing ella sálarligan ágang. Úrslitið verður tað sama, fiskimaðurin verður við svirið so.

Tað er tí neyðugt, at nakað verður gjørt, um fiskimenn skulu fáa nakað, sum teir bæði hava goldið fyri og hava uppiborið. Men ein kann ikki vænta, at tey sum vara av slíkum málum, fara at geva fiskimanninum tað hann eigur. Millum hesi fólk tykist breið semja verða um, at vanligur mannarættur ikki er so umráðandi, tá talan er um fiskimenn. Dømi: ein løgfrøðingur sigur í ramasta álvara, at fleiri lógarbrot, sum vórðu staðfest á Almannastovuni vóru í fínasta lagi. Niðurstøðan hjá hesum fólkum er tann, at eitt nú fiskimenn ikki eru vardir av lógini. Tí er bara eitt at gera hjá fiskimonnum, tað er at berjast fyri sínum rætti. Hesin rættur skal vinnast við at leggja trýst á myndugleikarnar, um neyðugt, skal flotin verða lagdur. Flotin skuldi verið lagdur fyri fleiri árum síðani, tí so høvdu bæði myndugleikar og reiðarar verið noyddir at givið fiskimonnum tað, teir høvdu uppiborið tá, og uppgávan hjá komandi formanni í Fiskimannafelagnum hevði verið munandi lættari nú. Men eg eri klárur til hesa uppgávu og gleði meg at stríðast fyri tann føroyska fiskimannin, sum er stoltleiki Føroya.